# Uppskot til vegleiðing
# um innsavnan, handfaring, goymslu og miðlan av persónsupplýsingum millum dagstovnar[1] og til fólkaskúla[2].

## Endamál

Vegleiðingin snýr seg um persónsupplýsingar um børn á dagstovni, um miðlan av persónsupplýsingum millum dagstovnar og frá dagstovni og til skúla. Talan er um upplýsingar, sum eru neyðugar fyri trivnaðin hjá barninum á dagstovninum og í skúlanum.

## Foreldur

Foreldur hava skyldu  at lata dagstovninum, har barnið gongur, upplýsingar sum stuðla uppundir trivnaðin hjá barninum.

Upplýsingar um eitt barn kunnu vanliga ikki latast øðrum myndugleikum uttan samtykki frá foreldrunum uttan so, at hetta er lógarkrav ella neyðugur liður í viðgerðini av málinum v.m., sbr. § 27, stk. 1, í Fyrisitingarlógini og § 9, stk. 1, í Persónsupplýsingarlógini.

Foreldur hava rætt til at fáa at vita, hvørjar upplýsingar dagstovnurin savnar og goymir um teirra barn. Avmarkingar í kunning av foreldrum kann bara vera undantaksvís og fyribils fyri at verja innanhýsis virksemi ella eina kanningartilgongd hjá myndugleikanum.

Tað av foreldrunum, sum ikki hevur foreldrarættin, hevur rætt til at fáa eina almenna kunning um viðurskiftini hjá barninum frá dagstovninum sbrt. § 18 í Lov om forældremyndighed og samvær.

## Neyðugar persónsupplýsingar

Neyðugar persónsupplýsingar at lata millum dagstovnar og til skúla kunnu m.a. snúgva seg um heilsu, serligan tørv, líkamligan og sálarligan førleika til at luttaka í virkseminum á dagstovninum. Her meinast við upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at tryggja vælferðina, menningina og innlæringina hjá barninum.

Neyvari lýst kunnu dømi um persónsupplýsingar vera:

a) Almennar upplýsingar um almenna (sosiala) støðu og menning.
b) Undirvísingarligar, læknafrøðiligar, sálarfrøðiligar, serundirvísingsligar og aðrar greiningar og serlig átøk fyri børn, umsóknir um stuðulstímar, serundirvísing, ætlanir vegna serligan tørv, og aðrar bakgrundsupplýsingar sum stuðla uppundir vælferðina og tillagingina.
c) Eitt og hvørt skrivligt ella digitalt tilfar s.s. frágreiðingar, greiningar og ummæli, ið snúgva seg um vælferðina hjá barninum.

---

[1] Sí §3 í løgtingslóg nr. 67 frá 10.05.2000 um dagstovnar og dagrøkt við seinri broytingum.

[2] Sí §4 í løgtingslóg nr. 125 frá 20.06.1997 um fólkaskúlan við seinri broytingum.

## Tagnarskylda

Ansast skal eftir fullari tagnarskyldu um omanfyri umtalaðu persónsupplýsingar. Um tagnarskylduna hjá starvsfólki kommununnar, sí § 26 í Fyrisitingarlógini og § 51 í Barnaverndarlógini. Ikki er loyvt at lata persónsupplýsingar um børn á dagstovni til aðrar myndugleikar enn teir, sum eru nevndir í hesi vegleiðing.

## Handfaring og innsavnan av persónsupplýsingum

Í sambandi við viðferð og innheinting av upplýsingum skal ansast eftir, at arbeiðið verður gjørt við støði í sakkunnnleika, viðkomandi og lógligum hátti, og at handfaringin er í samsvar við lógirnar um Fyrisiting og Persónsupplýsingar. Ansast skal eftir, at innheinting av upplýsingum ikki fer víðari, enn svarar til endamálið. Ansast skal eftir, at upplýsingarnar eru álítandi.

## At miðla persónsupplýsingum

Tá eitt barn flytur frá einum dagstovni til annan dagstovn ella til skúla, skal dagstovnaleiðarin so skjótt sum til ber síggja til, at neyðugar upplýsingar verða fluttar móttakaranum á tryggan og haldgóðan hátt samsvarandi lógunum, ið eru lýstar omanfyri. Um ongar upplýsingar fyriliggja um dagstovnin ella skúlan barnið flytur til, verða upplýsingarnar ikki sendar fyrr en móttøkustovnurin /skúlin hevur biðið um tær.

Dagstovnaleiðarin ella annað til tess skikkað kommunalt starvsfólk ger eina meting av, hvørjar tøkar uppýsingar eru neyðugar fyri komandi skúlagongd barnsins og hevur ábyrgdina av at miðla hesar.

Dagstovnaleiðarin hevur skyldu til at greiða foreldrunum frá, hvørjar upplýsingar fylgja barninum á nýggjan dagstovn/skúla og um rættin hjá foreldrunum til at skula geva samtykki og fáa kunning um hetta. Í námsætlanini hjá dagstovninum skal tilskilast, hvørjar upplýsingar skulu fylgja barninum.

## Ábyrgd fyri persónsupplýsingum

Dagstovnaleiðarin hevur ábyrgd av handfaring og goymslu av upplýsingum, og at tær lúka tey krøv, sum er ásett í lógunum um Fyrisiting og Persónsupplýsingar.

Tá eitt barn fer úr dagstovni í skúla, og einki sakligt grundarlag er fyri at goyma upplýsingarnar longur, skulu upplýsingarnar burturbeinast beinavegin.

## Goymsla

Persónsupplýsingar skulu goymast í einum læstum skápi. Tá persónsupplýsingar um børn eru skrásettar og goymdar digitalt, skal tryggjast, at hesar eru bert atkomiligar fyri viðkomandi starvsfólk.